**Býráðsfundur 28.08.2023 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | Avboð |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | Avboð |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 68/2023 – Gynga til Barnagarðin | ALMENT |
| Mál nr. 69/2023 – Alment vesi í Mathias´sa Pakkhúsi | ALMENT |
| Mál nr. 70/2023 – Umvæling av alis- og evnafrøðistovu | ALMENT |
| Mál nr. 71/2023 – Broyting av byggisamtykt | ALMENT |
| Mál nr. 72/2023 – Starvsfólk til umsitingina | ALMENT |
| Mál nr. 73/2023 – Eyka játtan til Heygsveg 1. viðgerð | ALMENT |

**Mál nr. 68/2023 – Gynga til Barnagarðin ALMENT**

J.nr.: 1802-3-2023

Nes kommuna hevur fingið tilboð frá Innspark uppá nýggja gyngu til Barnagarðin. Verandi gyngan er í ringum standi.

Tilboðið frá Innspark er á eina gyngu úr Robinja træi, sum er viðlíkahaldsfrítt. Tilboðið er uttan uppsetan og mvg og ljóðar á kr. 16.750.

**Á fundi, tann 15.08.2023, mælir Trivnaðarnevndin til at taka av tilboðnum frá Innspark á kr. 16.750 u/mvg.**

**Á fundi, tann 22.08.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini og taka av tilboðnum frá Innspark á kr. 16.750 u/mvg. Peningurin verður tikin av stovninum "Barnagarðurin/vøggustova íløga".**

**Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 69/2023 – Alment vesi í Mathias´sa Pakkhúsi ALMENT**
J. nr.: 1106-3-2023

Tann 12.07.2023 var lisitatión viðv. almenna wesinum í Mathias´sa Pakkhúsi. Tað var bert Jóhan Smith Jensen sum gav tilboð. Hin, sum var boðin at lata tilboð inn, gav avboð.

Tilboðið frá SJS ljóðar á kr 265.598. Metingin frá Fuglark var 264.540 u/mvg. Aftaná hevur fundur verið millum JSJ og Fuglark.

Fuglark mælir til at taka av tilboðnum á kr. 265.598 u/mvg.

**Á fundi tann 16.08.2023 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum á kr.265.598 u/mvg.**

**Á fundi, tann 22.08.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at taka av tilboðnum frá JSJ á kr. 265.598 u/mvg. Peningur verður tikin av kontoini, alment wc.**

**Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 70/2023 – Umvæling av alis- og evnafrøðistovu ALMENT**
J.nr.: 1901-1-2023

Tann 27.06.2023 var lisitatión viðv. umvæling av alis- og evnafrøðistovuni í Tofta skúla. Tað var bert KBH sum gav tilboð uppá arbeiðið. Allir hinir lokalu arbeiðstakararnir, sum annars vórðu bodnir at lata tilboð inn, høvdu annaðhvørt givið avboð ella møttu ikki upp.

Tilboðið frá KBH ljóðar á kr. 1.718.537.

Metingin frá Teknistovuni í Gøtu var 1,8 mió.

Teknistovan í Gøtu, sum hevur staðið fyri útbjóðingini, mælir til at taka av tilboðnum.

**Á fundi tann 16.08.2023 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá KBH á kr. 1.718.537 u/mvg.**

**Á fundi, tann 22.08.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at taka av tilboðnum frá KBH á kr. 1.718.537 u/mvg. Peningurin verður tikin av stovninum "Nýggi skúli íløga".**

**Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 71/2023 – Broyting av byggisamtykt ALMENT**
J.nr.: 1203-3-2023

Bústaðarmynstrini í kommununi eru nógv broytt seinastu árini og verandi byggisamtykt treingir til dagføringar.
Í fleiri førum eru ynskir um at hava fjølbroyttari bústaðarbygging, eitt nú við at byggja smærri íbúðareindir.

Av tí at stórur partur av byggiøkinum í Nes kommunu er B-øki, sum bert loyvir sethúsabygging, ynskir tekniska nevnd at broyta B-øki til eisini at umfata íbúðarbygging.

Umsitingin hevur tí orðað eitt uppskot til dagføringar av ásetingunum í byggisamtyktini. Broytingarnar eru sambært viðlagda skjalið.

**Á eyka fundi tann 28.08.2023, mælir Tekniska nevnd til at taka undir við broytingunum.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 72/2023 – Starvsfólk til umsitingina ALMENT**

J. nr.: 2701-7-2023

Í langa tíð hevur verið greitt, at tørvur er á einum skrivstovufólki afturat til kommunalu fyrisitingina. Seinastu árini hevur verið neyðugt at tilkalla fyrrverandi starvsfólk at hjálpa til.

Á fundinum í mai greiddi kommunuskrivarin nærri frá tørvinum. Síðani er ein nærri lýsing gjørd saman við Metis.

Metis mælir til, at eitt skrivstovufólk verður sett, so nakrar av uppgávunum hjá kommunuskrivaranum verða fluttar til nýggja fólkið, eins og at uppgávubýtið innanhýsis verður endurskoðað.

**Á fundi, tann 22.08.2023, mælir Fíggjarnevndin til at lýsa eftir einum skrivstovufólki fulla tíð, við møguleika fyri niðursettari tíð.**

**Tilmæli frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 73/2023 – Eyka játtan til Heygsveg 1. viðgerð ALMENT**

J.nr.: 1201-5-2021

Í samband við liðugtgerð av Heygsvegi eru meirveitingar, sum hevur við sær, at peningur kemur at vanta á stovninum "Vegur íløga". Sambært roknskaparleiðaranum er talan um kr. 901.795.

**Á fundi, tann 22.08.2023, mælir Fíggjarnevndin til at játta kr. 901.795 eyka í samband við Heygsveg til stovnin "Vegur íløga". Peningurin verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**